*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

# ÚTBÚGVINGAR

## Klaksvíkar sjómansskúli



Sjómansskúlin í Klaksvík bjóðar tríggjar útbúgvingar.

**Skiparaútbúgvingin** tekur 1,5 ár, Skiparaútúgvingin gevur rætt til at vera stýrimaður og skipari á øllum støddum av fiskiskipum. Eisini gevur skiparaprógvið rætt til at vera stýrimaður ella skipari á handilsskipum upp til 3000 BT.

Fyri at sleppa inn á skiparaútbúgvingina krevst 12 mánaða samlað siglingartíð við skipum yvir 20 BT. 3 mánaðir av hesum við fiskiskipum yvir 20 BT.

Harafturat krevst góðkend sjón- og hoyrnarroynd, sum er yngri enn 3 ár, og fráfaringarroynd fólkaskúlans ella líknandi.

Hevur tú tikið sjóvinnuskúlan, so gevur tað 9 mánaða siglingstíð.

**Kokkaútbúgvingin** tekur 6 mánaðir. Kokkaskúlin í Klaksvík gevur fyrst og fremst førleikar til kokkaarbeiði umborð á skipi, men tey eru fleiri, ið við pappírunum eru farin á dagstovn og røktarheim at arbeiða sum kokkar. Kokkaskúlin tekur næmingar inn tvær ferðir um árið, og eingin førleiki krevst fyri at sleppa inn á skúlan. Tikið verður inn tvær ferðir um árið.

**Frálæran í Sjóvinnuflokkinum** tekur somuleiðis 6 mánaðir, og tikið verður inn í januar og í august. Útbúgvingin svarar til tað, sum í Danmark eitur Søfartsskolen, og sum í Danmark er kravt fyri at kunna mynstra. Her heima verður útbúgvingin í stóran mun tikin av teimum, ið ætla sær víðari til navigatør. Hetta skúlaskeiðið gevur gott grundarlag undir víðari nautiskari útbúgving. Fleiri av næmingunum taka umframt sjóvinnuflokkin eisini Dugnaskaparskeið í sigling, sum gevur loyvi at føra bátar upp til 100 tons út á 30 fjórðingar.

Í løtuni eru 14 kokkar og 25 skiparar á skúlanum. Undirtøka var ikki fyri fyri einum sjóvinnuflokki í vár, men tikið verður innaftur í heyst.

www.klaknav.fo

## Heilsuskúlin



Á Heilsuskúla Føroya kanst tú útbúgva teg til Heilsuhjálpara og Heilsurøktara.

**Útbúgvingin til heilsuhjálpara** tekur 1 ár og 3 mánaðir, har skift verður ímillum at vera á skúla og úti í starvsvenjing á stovnum og røktarheimum. Til heilsuhjálpara krevst 9. flokkur + eitt ára starvsroyndir ella 10. flokksprógv. Sum útbúgvin heilsuhjálpari, kanst tú útbúgva teg víðari til heilsurøktara. Starvspláss hjá heilsuhjálparum eru til dømis Nærverkið, Ellis og røktarheim, Sambýli, ella starv sum stuðul.

Í **Heilsurøktaraútbúgvingini**, sum tekur 1 ár og 10 mánaðir, er helvtin ástøði og helvtin starvsvenjing. Til heilsurøktara krevst heilsuhjálparaútbúgving ella onnur útbúgving og arbeiðsroyndir, sum svara til heilsuhjálparaútbúgvingina í longd.

Sum heilsurøktari kanst tú fara víðari til fysioterapeut, ergoterpeut, sosialráðgeva, sjúkrarøktarfrøðing ella námsfrøðing í Danmark. Flestu víðari útbúgvingar krevja tó ískoytislærugrein. Eisini ber til at útbúgva seg til sjúkraflutningsstarvsfólk. Starvspláss hjá heilsuhjálparum og røktarum eru til dømis Nærverkið, ellis og røktarheim, sambýli, starv sum stuðul, Sjúkrahúsverkið og psykiatriska økið.

Tað er stórur eftirspurningur eftir heilsuhjálparum og heilsurøktarum, tí er lætt at fáa arbeiðiðeftir lokna útbúgving.

Heilsuskúlin húsast í spildurnýggja skúladeplinum í Hovi, har eisini studentaskúlin í Suðuroy heldur til.

heilsuskulin.fo

## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er ein alternativ miðnámsútbúgving, ið gevur atgongd til víðari lesnað á hægri lærustovnum, men tú kanst eisini fara í beinleiðis starv í vinnuni, eftir lokna útbúgving.

Skúlin húsast í spildurnýggjum hølum á gomlu ferjuleguni í Vestmanna. Eftir nógv ár í trongum hølum er Fiskivinnuskúlin nú sera nýmótans, og hann er útgjørdur við øllum hugsandi hentleikum.

Umframt undirvísingina verður eisini farið út í vinnuna av og á, t.d. verður vitjað á flakavirkjum.

Útbúgvingin gevur eitt HIF prógv, sum kann sammetast við HH og HT. Tað er ein sonevnd yrkisgymnasial útbúgving. Samstundis sum hon er vinnulívsrættað, er hon eisini lestrarfyrreikandi.

Prógvið gevur sostatt førleikar til bæði vinnulívsarbeiði og hægri lestur.

Undirvísingin er skipað soleiðis, at fyrsta árið er eitt støðisár og síðani eru tvey ár við bæði vallærugreinum og kravdum lærugreinum. Bæði yrkislærugreinum, men eisini vanligu gymnasialu lærugreinunum.

Fiskivinnuskúlin snýr seg ikki bert um fiskivinnu, men um vinnu og tilfeingi sum heild. Dentur verður serliga lagdur á matvørður, íverksetan og verkætlanararbeiði.

Fiskivinnuskúlin tekur ein flokk inn árliga, og hann byrjar eftir summarferiuna. Tað vil siga, at umleið 24 næmingar byrja hvørt summar.

www.fiskvest.fo



## Húsarhaldsskúlin

Húsarhaldsskúlin hevur hvørt heyst eitt langt húsarhaldsskeið, sum varir 26 vikur. Har er frálæra í lærugreinum sum brúkaralæra, reinføri, samfelagslæra, fyrstahjálp, brandskeið og eisini verður kunnað um onnur evni í samráð við næmingarnar. Frálæra er eisini í aerobic og drama, og arbeitt verður tvørfakliga við ymiskum verkætlanum.

Á hondarbeiðsøkinum er fjølbroyttar lærugreinar eitt nú seyming, leður og skinnarbeiði, brodering, føroysk bond, silkimáling, patchwork.

Næmingarnir skulu vera fyltir 16 ár, áðrenn skúlin byrjar, og búð verður á skúlanum.

Skúlin hevur búpláss fyri 21 næmingum.

Í frítíðini er virksemi ein tíðandi partur av uppihaldinum, og tí verður skipað fyri hugnakvøldum eina ferð um mánaðin

**Skeiðsvirksemi:** Í várhálvuni bjóðar skúlin ymisk styttri skeið. Til dømis eru skeið í heilsugóðum mati og hondarbeiðskeið, m.a. ber til at læra at gera ymisk pløgg til føroyska búnan.

Styttru skeiðini eru skipað bæði sum vikuskiftisskeið og sum vikuskeið. Undirvíst verður í seyming av vestum og buksum til føroyska mannfólkabúnan. Skeið sum "Heilsugóður matur og handarbeiði" eru afturvendandi tiltøk og skeiðluttakarnir koma úr øllum landinum.

www.husarhaldsskulin.fo

## Vinnuháskúlin

Vinnuháskúlin bjóðar fýra útbúgvingar: Skipara, Skipsførara, Maskinist og Maskinmeistara.

Upptøka av næmingum fer fram tvær ferðir um árið, eftir nýggjár og eftir summarfrítíðina.



Somuleiðis er próvtøka tvær ferðir um árið til allar útbúgvingar.

**Maskinmeistari:** Maskinmeistaraútbúgvingin tekur 3 ár. Hon er bygd upp sum ein modulskipan, har modulini vara eitt hálvár. Hvørt hálvár verða undirvísingarmodul koyrd, sum í flestu førum enda við próvtøku við endan á hálvárinum. Næsta hálvár koyra so nøkur onnur modul. Útbúgvingin gevur førleika til fáa sjóvinnubræv, tá ið krøvini til starvsvenjing eftir manningarlógini eru lokin. Hetta gevur rættindi at sigla sum maskinmeistari, við rang samsvarandi starvsvenjing, á øllum støddum av motorskipum.

**Maskinist:** Maskinistútbúgvingin tekur umleið 9 mánaðir. Her ganga næmingarnir fyrst í skúla í 1⁄2 ár, og fáa undirvísing í teknisku fakunum. Eftir próvtøku í teknisku fakunum, verða neyðug skeið tikin og hetta tekur á leið 3 mánaðir.

Útbúgvingin gevur førleika til at sigla við rang upp til 2.maskinmeistara á øllum skipum, og við rang upp til maskinstjóra við skipum við framtøkumegi upp til 2999 kW, tá ið neyðug starvsvenjing er nádd.

**Skipari og Skipsførari:** Skúlagongdin til skipara tekur 1 1⁄2 ár. Upptøkukravið til skipara er, at tú hevur minst 12 mánaða samlaða siglingstíð við skipum yvir 20 BT. 3 mánaðir av hesum við fiskiskipum yvir 20 BT. Harafturat krevst góðkend sjón- og hoyrnarroynd (bláabók), sum er yngri enn 3 ár, og fráfaringarroynd fólkaskúlans við próvtalinum 6 í viðkomandi lærugreinum.

Upptøkukravið til skipsførara er, at tú hevur staðið útbúgvingina til skipara.Skúlagongdin til skipsførara tekur 1 1⁄2 ár til skipara og síðani 1 1⁄2 ár til Skipsførara, tað vil siga trý ár í alt. Harumframt skalt tú sigla 6 mánaðir við skipum yvir 500 BT. Harafturat krevst góðkend sjón og hoyrnarroynd (bláabók), sum er yngri enn 3 ár.

Skúlin lýkur STCW krøv, og tað merkir, at útbúgvingarnar eru á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim. Í dag ganga yvir 200 næmingar á skúlanum.

www.vinnuhaskulin.fo